VIÐMERKINGAR

# Lønardeildin forðar við ósakligari málsviðgerð teimum lægstløntu at fáa lønarbata

**Føroya Arbeiðarafelag**
*rs avn, in anuar*



Sum kunnugt hevur Føroya Arbeiðarafelag umboðandi dagrøktarar skrivað undir sáttmála við Kollafjarðar Kommunu, Sjóvar Kommunu, Hósvíkar Kommunu, Fuglafjarðar Kommunu, Runavíkar Kommunu, Vágs Kommunu, Tvøroyrar Kommunu umframt við Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag umboðandi 21 kommunum.

Talan er um vanligar sáttmálasamráðingar, har roynt hevur verið at fingið ávísar lønarhækkingar framdar fyri ein starvsbólk sum frammanundan er ein hin lægstlønti í landinum, hóast hesin løntakarabólkur skal taka sær av týdningarmesta tilfangi okkara, nevniliga teimum børnum sum vaksa upp í samfelag okkara.

Hesar samráðingar hava verið førdar á vanligan hátt, har partarnir hvør í sínum lagi hava ført fram sjónarmið síni, og partarnir hava síðani funnið fram til semju, soleiðis at sáttmáli var undirskrivaður í hvørjum einstakum føri.

**Lønin hjá dagrøktarum**

Nógv hevur verið tosað um lønina hjá dagrøktarunum, men ikki øll geva sær fær um, at tá kommunurnar tosa um »løn«, so leggja teir vanliga lønina saman við endurgjaldinum fyri beinleiðis útreiðslurnar, sum dagrøktararnir hava í sambandi við keyp av mati, mjólk, leiku umframt økta el- og oljunýtslu og slit av heiminum, har børnini verða ansaði.

Útrokningar okkara hava víst, at í flest øllum kommunum hava dagrøktararnir (dagrøktarmammurnar) havt eina mánaðarløn, sum hevur ligið millum kr. 8.000,00-9.000,00 fyri ansing av 5 børnum ella meira í upp til 10-11 tímar um dagin.

Veruliga tímalønin hjá dagrøktarum í flest øllum kommunum hevur tí ligið um kr. 30,00-50,00 kr.

Tann sokallaði 1/3 sum kommunurnar hava tosað um, hevur einki við løn at gera, tí dagrøktararnir hava nágreiniliga útroknað, at beinleiðis útreiðslur teirra liggja omanfyri hendan 1/3 sum útgoldin verður sum endurgjald fyri hesar beinleiðis útreiðslur, og hetta hava myndugleikarnir eisini viðurkent.

Lønin hjá dagrøktarunum hevur sostatt, áðrenn Føroya Arbeiðarafelag gjørdi sáttmála við avvarðandi kommunur, bert verið sløk helvt av vanligu sáttmálalønini hjá ófaklærdum arbeiðsfólki í Føroyum.

Lønardeildin brúkar ósakliga málsviðgerð í royndum sínum at forða dagrøktarunum í at fáa eina rímiliga løn.

Fyrsti sáttmálin sum Føroya Arbeiðarafelag gjørdi var við Kollafjarða Kommunu, har dagrøktararnir høvdu ynskt at hava eins løn uttan mun til, hvussu aldursbýtið var á teimum børnum, sum dagrøktarar skuldu hava í dagrøkt.

Kollafjarðar Kommuna sendi Fíggjarmálastýrinum nevnda sáttmála til góðkenningar, og einasta viðmerkingin sum Karsten Hansen, landsstýrismaður og leiðarin á lønardeildini høvdu var, at teir mettu, at tað var óheppið, at 1. mai er fastur frídagur hjá dagrøktarum (dagrøktarmammum), tá hesin dagur ikki er fastur frídagur hjá øðrum sum starvast innan barnaansing.

Hetta skriv frá Fíggjarmálastýrinum er dagfest 28.09.00.

Eftir at Føroya Arbeiðarafelag hevði gjørt sáttmála við Hósvíkar Kommunu um sáttmála fyri dagrøktarar, sendi kommunan sáttmálan til Fíggjarmálastýrið til góðkenningar, og við skrivi dagfest 31.10.00 skriva Karsten Hansen, landsstýrismaður og leiðarin á lønardeildini kommununi bræv, har teir ikki bert leggja seg út í ásetingina um, at 1. mai skal vera fastur frídagur, men eisini leggja seg út í hvussu Føroya Arbeiðarafelag og Hósvíkar Kommuna hava avtalað lønarskipanina hjá dagrøktarunum.

Eisini leggur Fíggjarmálastýrið seg út í ásetingina um, at børnini skulu hava matpakka og skiftiklæðir við, umframt ásetingarnar í sáttmálanum um, nær børnini skulu verða heintaði, tá tey eru í dagrøkt 1/2 tíð.

Landsstýrismaðurin og leiðarin á lønardeildini viðmerkja í hesum sambandi:

»Hetta eigur at verða ásett í reglugerð fyri dagrøktina, sum dagrøktarskipanin skipar fyri«

Her roynir Fíggjarmálastýrið at forða dagrøktarunum í at fáa greiðar reglur um, hvat børnini skulu hava við í dagrøkt og nær dagrøktarin kann vænta, at børnini verða avheintaði, tá tey eru 1/2 tíð í dagrøkt.

Vit skulu harðliga átala, at almennur myndugleiki leggur seg út í slíkar spurningar, og nærum roynir at tvinga fakfelag og løntakara at góðtaka at arbeiðsgevaraparturin einsæris skal áseta slíkar reglur, sum beinleiðis koma at ávirka arbeiðsumstøðurnar hjá dagrøktarunum.

Fíggjarmálastýrið endar hetta skriv sítt soleiðis:

»Sáttmálin verður góðkendur við teirri treyt, at omanfyri nevnda verða rættað næstu ferð sáttmálin verður gjørdur«.

Føroya Arbeiðarafelag gjørdi einaferð í heyst sáttmálar við Fuglafjarðar Kommunu, Runavíkar Kommunu, Tvøroyrar Kommunu og Vágs Kommunu.

Vit hava enn ikki fingiað nakra formliga fráboðan um, hvørt Fíggjarmálastýrið eisini hevur lagt seg út í hesar sáttmálar.

Í november 2000 gjørdi Føroya Arbeiðarafelag sáttmála við Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag viðvíkjandi lønar- og starvssetanarviðurskiftunum hjá dagrøktarunum í 21 kommunum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið sendi Fíggjarmálastýrinum nevnda sáttmála til góðkenningar og vit hava seinni fingið avrit av skrivi dagfest 07.12.00 frá lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum til Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Hetta skriv er bert undirskrivað av einum fulltrúa, sum starvast á lønardeildini og ikki av landsstýrismanninum ella leiðaranum á lønardeildini.

Hetta skriv er ein beinleiðis provokatión móti okkum sum fakfelag, og dagrøktarunum sum løntakarar.

Nú fer lønardeildin inn og leggur seg út í hvussu lønarskipanin er og m.a. verður heitt á kommunala Arbeiðsgevarafelagið um at rætta ásetingarnar um løn, soleiðis at lønin fyri 1 barn verður 20% av lønini á avvarðandi lønarstigi og ikki 21.25%, sum ásett er í sáttmálanum.

Her krevur lønardeildin at avtalaða lønin sum er kr. 2.937,37 fyri hvørt barnið pr. mánaða verður sett niður til kr. 2.773,67 fyri hvørt barnið pr. mánaða.

Her er talan um so greiða ósakliga málsviðgerð, at Føroya Arbeiðarafelag ikki ætlar at lata hetta fara aftur við borðinum, men um neyðugt ætla vit at fara í rættin fyri at fáa staðfest, at Fíggjarmálastýrið her er farið út um heimildir sínar.

Ikki nokk við at lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum her roynir at forða dagrøktarunum í at fáa eina rímiliga lønarhækking, men við hesum skrivi leggur lønardeildin seg eisini út í avtaluna um at 1. mai skal verða fastur frídagur og enntá fer lønardeildin so langt, at hon noktar dagrøktarunum at fáa partvísa løn undir sjúku, soleiðis at hendan løn saman við dagpeninginum kann tryggja dagrøktarunum, soleiðis at hesir ikki missa løn, um teir gerast sjúkir.

Lønardeildin tykist at vassa longur og longur út í royndum sínum at forða dagrøktarunum í at fáa rímiliga løn, tí skrivið dagfest 07.12.00 til Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag endar soleiðis:

»Sáttmálin verður góðkendur við tí treyt (okkara undirstriking) at omanfyri nevndu rættingar verða gjørdar«.

Vert er at býta merki í at dagrøktararnir í Tórshavnar Kommunu í áravís hava havt eina løn sum er ávíkavist 20% og 25% av lønini á ávísum lønarstigi, og lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum hevur okkum vitandi uttan viðmerkingar góðkent sáttmálan sum galdandi er í Havn.

**Lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum ger mismun á løntakarum**

Tað er ein meginregla í allari fyrisiting, at borgarar landsins skulu viðgerast eins, og tí er her talan um klárt brot á vanligu fyrisitingarligu grundregluna sum lønardeildin hevur framt, nú tey nokta góðkenning av lønarskipan í sáttmála, sum Føroya Arbeiðarafelag hevur gjørt, hóast lønardeildin áður hevur góðkent meinlíka lønarskipan hjá øðrum fakfelag.

Ikki bert fremur lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum groft brot á vanligar fyrisitingarligar reglur, men vit hava við hesum eisini staðfest, at lønardeildin miðvíst tykist at forða Føroya Arebiðarafelag í at fáa limum felagsins rímiliga lønar- og setanartreytir, og hetta fara vit sjálvsagt als ikki at góðtaka.

**Karsten Hansen svarar ikki skrivum okkara**

Føroya Arbeiðarafelag hevur við skrivi dagfest 20.12.00 skrivað Karsten Hansen, landsstýrismanni bræv, har vit vísa á frammanfyri nevndu viðurskifti og har vit biðja um eina nærri frágreiðing frá landsstýrismanninum persónliga.

Einasta svar sum vit hava fingið er frá lønardeildini, har sami fulltrúi, sum hevur skrivað upprunaliga skrivið til Kommunala Arbeiðsgevarafelagið boðar frá, at landsstýrismaðurin er burturstaddur og ikki verður aftur til arbeiðis fyrr enn 1 vika er farin av januar mánaða 2001.

Vit hava sostatt framvegis einki frætt frá landsstýrismanninum, hóast talan er um álvarsmál, sum hóttir við at fáa sera óhepnar avleiðingar fyri meginpartin av dagrøktarunum í Føroyum og dagrøktarskipaninar sum heild.

**Spurningurin um 1. mai sum frídag**

Karsten Hansen, landsstýrismaður hevur sum nevnt frammanfyri boðað frá, at hann ikki kann góðtaka at dagrøktarar fáa 1. mai sum frídag, hóast allir aðrir limir okkara í áravís hava havt frí hendan altjóða arbeiðaradag.

Samskiftið innan samgonguna og innan Tjóðveldisflokkin tykist ikki at vera tað besta, tí so at siga samstundis hevur landsstýrismaðurin í Undirvísingar- og Mentamálum Torbjørn Jacobsen boðað frá, at ætlan hansara var at avtaka grundlógardagin sum fastan frídag hjá skúlunum og í staðin brúka 1. mai sum fastan frídag.

Sjónarmiðini hjá landsstýrismanninum í Fíggjarmálastýrinum fyri at forða dagrøktarunum í at hava frí 1. mai halda als ikki, og tykjast at byggja á somu ósakligu viðgerð, sum alt hetta mál hevur fingið í Fíggjarmálastýrinum.

Fíggjarmálastýrið góðtekur stóra lønarhækking hjá løgtingslimum, men unnar ikki vanliga løntakaranum nakrar krónur afturat í lønarposan.

Helst minnast allir føroyingar tað risastóru lønarhækking sum fyri fáum árum síðani varð latin løgtingslimum okkara.

Hendan lønarhækking var helst í krónum 10 ella 20 fald tað peningaupphædd sum dagrøktararnir eftir nýggja sáttmálanum skuldu hava í lønarhækking.

Hesi dømi vísa hvussu lítla virðing politiski myndugleikin, og her serliga Fíggjarmálastýrið hevur fyri vanliga løntakaranum.

Lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum roynir, sum frammanfyri nevnt av øllum alvi at forða dagrøktarunum, sum eru ein av lægstløntu løntakarabólkum okkara, at fáa nakrar krónur afturat í lønarhækking, meðan Fíggjarmálastýrið í veruleikanum einki hevur gjørt fyri at forða fyri teimum risa lønarhækkingum, sum politikarir okkara fyri fáum árum síðani hava latið sær sjávlum.

Hesin leikur hjá Fíggjarmálastýrinum hevur avdúkað, at eisini í Fíggjarmálastýrinum er tað góðkendur politikkur, at tey sum hava mest skulu fáa meira, meðan tey sum frammanundan hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman skulu tvingast at verða verandi á sama lága lønarstøði teirra.

**Lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum sum góðkenningarmyndugleiki**

Sum kunnugt er Fíggjarmálastýrið okkara størsti almenni arbeiðsgevari, og vit síggja undir hvørjum sáttmálasamráðingum, hvussu lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum roynir at forða fyri, at tey alment løntu fáa bøtt um lønar/ og starvssetanarviðurskifti síni.

Tað er tí sera óheppið, at sama lønardeild sum hjá Fíggjarmálastýrinum skal verða góðkenningarmyndugleiki, tá talan er um sáttmálar, sum m.a. felag okkara ger við kommunurnar, tí tað er bert arbeiðsgevarasjónarmið sum koma til sjóndar, tá lønardeildin skal viðgera og góðtaka slíkar sáttmálar. Talan er als ikki um sakliga fyrisitingarliga viðgerð, men ein ósaklig roynd at forða

*Framhald á síðu 19*

ítróttur

Nr. 16 • mikudagur • 24. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Steypadagur

**Í kvøld verða tríggjar av teimum fýra hálvfinalunum í Coca-Cola kappingini avgreiddar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at landsliðsuppgávurnar nú eru lagdar aftur um bak á hesum sinni, er longu klárt hjá hondbóltsleikarunum kring landið at fara í holt við næstu stóru uppgávurnar.

Hálvfinalurnar í Coca-cola kappingini, sum steypakappingin nú eitur, eru á skránni, og tríggjar av hesum verða avgreiddar í kvøld.

**Dupultbrak í Vestmanna**

Í Vestmanna hevur hondbólturin í ár fingið betri fastatøkur enn vanligt, nú bæði kvinnur og menn tykjast fullkomuliga einaráðandi í sínum deildum.

Umframt oddasessin í landskappingini hava liðini eisini leikt seg til hálvfinalurnar í steypakappingini, og tey hava bæði heimavøll í fyrru uppgerðini.

Kvinnurnar skulu taka ímóti Neistanum, og hóast havnarliðið tykist hava gjørt stór framstig í mun til grundspælið, so er einki at ivast í, at VÍF eru stórfavorittar í dystinum. Úrslitini í landskappingini tala sjálvsagt til fyrimuns fyri hetta, men harumframt hevur VÍF havt eitt sera gott tak á júst Neistanum. Havnargenturnar geva seg tó vanliga til tað allar seinasta, so spennandi verður at vita, um tær megna at skapa eitt óvæntað úrslit.

Hjá monnunum er talan um enn eina útgávu av klassikaranum yvir øllum í føroyskum hondbólti, tá Kyndil kemur á vitjan í Vestmanna.

**Er høvdið klárt**

Higartil er Kyndil einasta liðið, sum hevur skalað vestmenningunum, og tað tykist greitt, at ein favorittur verður sera torførur at finna í hesum dysti.

Størsti spurningurin er helst, hvussu klárir nógvu landsliðsleikararnir hjá VÍF eru í høvdinum, tá teir fara inn til dystin. Kropsliga eigur tað at hava givið teimum ein fyrimun, at teir nú hava verið partur í seks knallhørðum dystum, men mentalt kann tað verða torført at seta seg upp til eina slíka uppgávu nú. Vestmenningar høvdu ikki færri enn átta leikarar á landsliðnum, meðan Kyndil í sín lut átti fýra leikarar.

**StÍf vitjar í Havn**

Triði dysturin í kvøld verður í Havn, har mansliðini hjá StÍF og Neistanum fara at dystast. Eisini hetta tykist sum ein sera spennandi dystur, og skal metast eftir úrslitunum í grundspælinum, er so einki avgjørt. Her vunnu strandingar dystin í Havn, meðan teir heldur óvæntað máttu lúta á heimavølli.

Til stuttleikar kann nevnast, at tað hjá monnunm er talan um somu hálvfinaluluttakarar, sum í fjør. Tá eydnaðist tað sum kunnugt Kyndli at basa VÍF í sínum hálvfinalum, meðan Neistin vann seg fram til finaludystin við at basa StÍF. Sostatt hava havnarliðini í øllum førum hagtølini í sínum parti, men enn hav hesi ongantíð avgjørt ein dyst, og soleiðis verður neyvan hesa ferð heldur.

**VB og Stjørnan**

Fjórði av fyrru hálvfinaludystunum verður í Vági leygardagin, tá Stjørnan og VB spæla. Ferðasambandið ger tað at kalla ógjørligt at spæla hendan mitt í viku, og tí verður hann nú leiktur um vikuskiftið. Liðini spæla annars eisini landskappingardyst um vikuskiftið, og verður hesin leiktur sunnudagin.

Returdystirnir í Coca-Cola kappingini verða leiktir soleiðis. Týsdagin, 30. januar spæla Kyndil-VÍF og StÍF-Neistin hjá monnum. Mikudagin 31. januar spæla kvinnuliðini hjá Neistanum og VÍF, meðan Stjørnan eigur heimadyst móti VB tann 3. februar.




*Tað líkist einum sonnum braki, tá Kyndil í kvøld skal til Vestmanna, har fyrra hálvfinalan móti VÍF stendur á skránni*

# Stórkapping í billard

**Fyri stuttum varð annað umfarið í stórkappingini í billard spælt**

BILLARD
*Jákup Mørk*

Stórkappingin er eitt nýtt slag av kapping, sum verður roynt á fyrsta sinni í ár. Reglurnar eru soleiðis, at tey seks liðini, sum kappast, verða býtt í tveir bólkar. Í bólkunum spæla so teir seks luttakararnir (tveir á hvørjum liði) ímóti hvørjum øðrum, og stig verða so givin fyri dystirnar hvør sær.

Í fyrra bólkinum hesa ferð vóru Vágs billardfelag, Havnar Kluibbi og Klaksvíkar Klubbi, og varð støðan hjá einstøku luttakarunum soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sonhard, Klaksvíkar Klubbi | 6 stig |
| 2 | Niels, Havnar Klubbi | 6 |
| 3 | Tórður, Havnar Klubbi | 4 |
| 4 | Kristian Suni, Klaksvíkar Klubbi | 4 |
| 5 | Sámal P., Vágs Billardfelag | 2 |
| 6 | Birgir, Vágs Billardfelag | 2 |

Hægstu seriuna í bólkinum fekk Tórður Holm, 136, og tað var eisini Tórður, sum hevði hægsta miðaltalið, nevnliga 19,55 eygu.

Í hinum bólkinum kappaðust umbopðini fyri Fuglafjarðar Billardfelag, Tvøroyrar Billardfelag og Kaggan, og gjørdist endaliga støðan her:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Max, Tvøroyrar Billardfelag | 8 stig |
| 2 | Gullok, Tvøroyrar Billardfelag | 6 |
| 3 | Bjarni Skaalum, Kaggin | 4 |
| 4 | Njál, Fuglafjarðar Billardfelag | 2 |
| 5 | Jákup, Fuglafjarðar Billardfelag | 2 |
| 6 | Johannes, Kaggin | 2 |

Í hesum bólkinum hevði Max Rasmussen av Tvøroyri bæði hægsa miðaltalið og hægstu seriuna. Í miðal fekk hann 22,55 eygu, meðan besta serian kastaði 138 eygu av sær.

Samanlagt gjørdist tað sostatt Tvøroyrar Billardfelag, sum hevði bestu úrtøkuna hetta vikuskiftið, meðan Max Rasmussen úr sama felag var leikarin, sum hevði besta persónliga úrslitið. Steyp vórðu sjálvandi latin fyri hesi avrik, og vórðu hesi latin av Flogfelag Føroya.

Støðan eftir tey bæði fyrru umførini framgongur av yvirlitinum niðanfyri, har tað eisini sæst, hvussu tað gekst einstøku feløgunum hetta vikuskiftið.

| Felag | stig | eygu | miðal | stig íalt |
|---|---|---|---|---|
| Tvøroyrar Billardfelag | 14 | 32.114 | 20,09 | 3 |
| Vágs Billardfelag | 4 | 2.648 | 16,55 | 1 |
| Klaksvíkar klubbi | 10 | 2.736 | 17,1 | 1 |
| Havnar Klubbi | 10 | 2.658 | 16,61 | 0 |
| Kaggin | 6 | 2.478 | 15,49 | -1 |
| Fuglafjarðar Billardf. | 4 | 2.158 | 13,49 | -4 |